

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 02 - 2013

# Statoil letur útlendingum stórarbeiði

Hýrurin var ikki góður í norska ídnaðarfelagnum fyrradagin, tá Statoil kunngjørdi, at felagið hevði skrivað undir sáttmála við eina skipasmiðju í Suðurkorea um at byggja ein pall, sum felagið skal brúka á Dagny-leiðini (myndin). -Vit stúra nú fyri framtíðini hjá teimum norsku frálanda-skipasmiðjunum. Dagny-pallurin er tann sætta stóra uppgávan, sum norskur ídnaður hevur mist tað seinasta hálvárið, segði stjórin í Norsk Industri, Stein Lier-Hansen, við fjølmiðlarnar. Hann legði afturat, at um nøkur ár eru bíleggingarbøkurnar hjá Kværner, Aker Solutions og Aibel tómar. 10 mia. krónur Virðið á sáttmálanum, sum Statoil og samstarvsfeløgini Total og Det norske oljeselskap hava gjørt við Daewoo Shipbuilding & Marine Engineering um ein pall til Dagny-leiðina, er góðar seks milliardir norskar krónur. Suðurkoreanska skipasmiðjan er tann største í heiminum. Norskur ídnaður verður tó ikki við sviðusoð, tí sambært Statoil skal Aker Solutions veita ymsar tænastur í sambandi við byggingina. Sama dag, sum Statoil boðaði frá sáttmálanum við DSME, kunngjørdi ferlagið, at tað hevði latið trimum fyritøkum í Malaysia, Japan og Sveis uppgávuna at gera rør til Polarled-leiðingina millum Aasta Hansten-leiðina í Norðsjónum og Nyhamna-gassstøðina uttan fyri Molde. Her er sáttmálavirðið fýra milliardir krónur.